Vegna trygdarávum so verður leisturin fyri, hvussu man søkir um einstaklingatilskot til heilivág broyttur.

Framyvir skal mann rita inn umvegis Samleikan. Tað má vera læknin, sum ritar inn.

Sí fyrsta part av «Reseptvegleiðingini» fyri vegleiðing, hvussu mann ritar inn.

(Ístaðinfyri «Ordri til persón» velur mann «Umsókn um tilskot»




## Tilskotsformularar

Tá søkt verður er møguligt at velja millum 5 ymiskar skabelónir. Hetta minnir um fyrrverandi leist, tó eitt sindur broytt:




Snýr tað sum um ADHD/ADD, ciliedyskinesi, cystisk fibrose, fjølbrek, GSD, IKH, PKU ella Sucla 2 mutation, so er leisturin at velja Diagnosa, og so at skráseta tí ávísu diagnosuna har.

Er talan hinvegin um einstaklingatilskot til heilivág, velur mann einstaklingatilskot og antin tí generellu umsóknina ella tí serstøku skabelónina. Summi sløg av heilivági eitt nú melatonin hava eina serskilta skabelón við øðrum teigum. Hesi eru eisini at finna undir «Einstaklingatilskot.»

Undir medisinskt hjálparráð hoyra merkivørur og medisinsk útgerð, tvs. tílíkt ið ikki er heilivágur, men tørvur er á at søkja Tilskotsnevndina um stuðul til.

Neyðugt er at senda eina umsókn fyri hvørja vøru.

Lækni kann útdelegera sjálva skrásetingina. Hetta ger læknin við at geva fulltrú til ávís starvsfólk, eftir at læknin hevur rita inn.

## Lækni gevur fulltrú

Tað ger læknin við at trýsta á:




Her skrásetur hann síðani tey starvsfólk, sum hann ynskir at útdelegera skrásetingina til. Hann útfyllir eina trygga teldupostadressu hjá starvsfólkinum og navn á viðkomandi, og síðani verður tað goymt við at trýsta á «diskettina.»







Fleiri starvsfólk kunnu upprættast í sama umfari.

Eitt fyribils loyniorð dukkar upp, sum starvsfólkið má fáa. Tey fáa øll sama fyribils loyniorð.

Starvsfólkið verður síðani biðið um at broyta loyniorðið við fyrstu innritan.




Um tveir ella fleiri lækni hava givið sama persóni fulltrú, so kann viðkomandi starvsfólk velja vegna lækna hvønn viðkomandi søkir fyri.
Hetta kann gerast, tá fulltrúi innritar, við at velja ”På vegne af” og so tann ávísa læknan:




Mann kann eisini skifta lækna, meðan mann er í gongd við at útfylla umsókn:




Hava tit spurningar eru tit vælkomin at skriva til tilskot(kurla)apotek.fo.